## Ikki beinbrotin

Tað var ikki so galið, sum landsliðslæknin og Jákup á Borg óttaðust, eftir at Jákup noyddist skaddur av vøllinum,t á føroyar taptu 3-1 móti Rumenia leygardagin. – Fóturin sær øgiligur út, men eg hevði kalt umslag um alla tíðina, og longu í flogfarinum á vegnum byrjaði eg at kenna meg betur. So talan er hóast alt ikki um nakað brot, staðfestir Jákup á Borg, sum saman við restini av ferðalagnum kom heim í gjár.



## Føroyskt hæddarlop

Føroyski sigurin móti Litava gjørdi av álvara mun á styrkislistanum hjá FIFA. Føroyar lupu nevnliga 41 pláss uppeftir á listanum, soleiðis at vit nú eru nummar 122. Eisini í europiskum høpi munaði hetta væl, tí nú eru bæði Malta og Luxemburg farin aftur um Føroyar. Ovasta landið á listanum er annars Brasil. Spania er nummar tvey og Holland er nummar trý.

# Tættar uppgerðir í væntu




Tað plagar at ganga javnt og hart fyri seg, tá H71 og Kyndil hittast. Og eingin orsøk er at halda, at støðan verður nakað øðrvísi hesaferð

**Hjá monnunum eru tvey verulig brak á skránni, og hjá kvinnum verður spennandi at síggja, um StÍF hevur orku til at blanda seg í oddastríðið**




Jákup Mørk

Fult umfar er í teimum báðum fremstu hondbóltsdeildunum um vikuskiftið, og á pappírinum er líkt til, at fleiri sera áhugaverdar uppgerðir eru á skránni.

Hjá kvinnum tykist StÍF hava bygt sær eitt lið, sum við nýkomna útlendska styrkinum so smátt er til reiðar at taka upp kappingina við Tjaldur og Stjørnuna, og í so máta verður talan um veruliga styrkisroynd, tá StÍF vitjar í Klaksvík sunnudagin.

Hjá monnunum tykjast tey fimm ovastu at vera sera jøvn í styrki, og tí er talan mest sum hvørt vikuskifti um tvey brak.

Hesa ferð er annað av teimum longu leygardagin, tá VÍF – sum seinast vant burtur úr StÍF – vitjar hjá Neistanum, sum móti Kyndil legði rygg til sítt fyrsta tap hetta kappingarárið.

Sunnudagin tekur H71 móti Kyndli. Bæði liðini tóktust halta eitt sindur við kappingarbyrjan, men hoyvíkingar komu ígongd við sigrinum móti KÍF í gjár, og seinastu tveir dystirnar hevur Kyndil veruliga imponerað.

### Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

**Sunset-deildin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 18.10 | 15.00 | VB-Tjaldur |
| 18.10 | 15.00 | Neistin-VÍF |
| 18.10 | 15.00 | Stjørnan-StÍF |

**Atlantic Airways-deildin**

| | | |
|---|---|---|
| 17.10 | 17.00 | Neistin-VÍF |
| 18.10 | 16.20 | H71-Kyndil |
| 18.10 | 20.00 | KÍF-StÍF |

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 18.10 | 14.00 | SÍ-Fleyr |
| 18.10 | 14.00 | Mjølnir-ÍF |
| 18.10 | 14.00 | Dráttur-KÍF |

**Eik-ligan, menn**

| | |
|---|---|
| 17.10 | ÍF-Mjølnir |
| 18.10 | SÍ-Fleyr |

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 1 | 1 - 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 2 Fleyr | 1 | 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 2 |
| 3 KÍF | 0 | 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 Mjølnir | 0 | 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 TB | 0 | 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 Dráttur | 1 | 0 - 1 | 2 | 3 | -1 | 0 |
| 7 ÍF | 1 | 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 1 | 1 - 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 2 Mjølnir | 1 | 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| 3 Fleyr | 0 | 0 - 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 4 ÍF | 0 | 0 - 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 2 | 2 - 0 - 0 | 65 | 36 | 29 | 4 |
| 2 Tjaldur | 2 | 2 - 0 - 0 | 72 | 49 | 23 | 4 |
| 3 Neistin | 2 | 1 - 0 - 1 | 42 | 53 | -11 | 2 |
| 4 VB | 1 | 0 - 0 - 1 | 21 | 25 | -4 | 0 |
| 5 StÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 25 | 32 | -7 | 0 |
| 6 VÍF | 2 | 0 - 0 - 2 | 43 | 73 | -30 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 87 | 76 | 11 | 4 |
| 2 Neistin | 3 | 2 - 0 - 1 | 87 | 78 | 9 | 4 |
| 3 StÍF | 3 | 2 - 0 - 1 | 82 | 76 | 6 | 4 |
| 4 Kyndil | 3 | 2 - 0 - 1 | 85 | 85 | 0 | 4 |
| 5 H71 | 3 | 1 - 0 - 2 | 74 | 70 | 4 | 2 |
| 6 KÍF | 3 | 0 - 0 - 3 | 61 | 91 | -30 | 0 |